Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Stórfingið og væleydnað hátíðarhald

## *Oddagrein*

TAÐ stóra hátíðarhaldið fyri at 1000 ár eru liðin, síðani Føroyar vóru kristnaðar, eydnaðist væl, og er aftur eitt dømi um, at tað eru grundleggjandi virði, sum binda saman føroysku tjóðina.

TAÐ var sannur hátíðardámur til fagnaðarguðstænstuna í Havnar Kirkju, har Margreta drotning, Heindrikkur prinsur, danski kirkjumálaráðharrin og norðurlendskir biskuppar vóru til steðar saman við umboðum fyri fleiri kristiligar samkomur og kirkjur..

HETTA er aftur eitt dømi, at vit øll eru runnin av norrønari rót, og at vit enn hava tætt samstarv og at sambandið enn er gott, hóast vit onkuntíð finnast at íslendingum fyri at reka ov langt vestur á og í tí viðfangi gloyma norrønu rótina, málsliga og mentanarliga.

HARAFTURAT skal takast fram, at mentanarligu tiltøkini eydnaðust væl. Kvøldsetan í Norðurlandahúsinum hvítusunnuaftan vísti, at føroyingar eiga skapandi kreftir bæði til álvara og gaman, og at hesar kreftir væl kunnu samskipast í eitt slíkt føroyskt kvøld við sangi, framførslum og upplestri. Fyrireikararnir komu væl frá tiltakinum og í Útvarpinum tóktsit ljóða, at lagið var gott og fagnaðurin var stórur.

TAÐ var eisini ein stór uppliving at hoyra Jesus og Makedonararn í nýggjum sniði - nú gjørt til symfoniorkestur - og við frálíkum føroyskum og útlendskum røddum. Taðer at vóna, at vit kunnu fáa eina slíka upptøku á fløðu, tí hesin tónleikur og sangur smæðist ikki burtur ímillum tað stóra í hinum Norðurlondunum.

At so hátíðarhaldið eisini fekk eina dimensjón upp í við deknaguðstænastuni og drotningarvitjanini í Fugloy var áhugavert og stuttligt. Tað er jú deknaguðstænastan, sum hevur verið tann fasti tátturin í øllum smáplássunum, og hon eigur av røttum sín lut í kristnu mentanini her á landi. Áhugavert var at hoyra og a síggja, hvussu fugloyingar tóku ímóti Margretu drotning.

Spell, at tvídrátturin innan føroysku fólkakirkjuna skuldi kasta ein skugga yvir hátíðarhaldið, men hinvegin kunnu vit nú fegnast um, at meiri enn 800 fók vóru og lýddi á danska biskuppin í Kristianskirkjuni annan hvítusunnudag.

Hesa stórhending kunnu vit taka sum prógv um, at vit føroyingar vilja hava eina sanna og fría fólkakirkju, sum fundamental og sjálvrættvís hugsan ikki bítur á.

Samanumtikið eitt væl eydnað hátíðarhald, sum allir føroyingar kunnu fegnast um.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Sjálvstýrislógin er ikki alternativið - hon er loysnin

*Sjálvstýrisrørslan - ein fólkasøk*



Hyggja vit rundan um okkum í heiminum, so síggja vit, at allar sjálvstýrisrørslur koma innanífrá. Tað er eitt ynski, sum veksur fram í fólkinum, og hiðani gongur alt stríðið. Og soleiðis átti tað eisini at verið í Føroyum, um rætt varð borið at. Men alt meira bendur á, at avgerðin um føroyskt fullveldi, er løgd í hendurnar á dønum at gera av. Hon er treytað av danskari vælvild og stórsinni, og teir eiga próvbyrðuna fyri, at tað skal bera til. Hetta er ein sera mannminkandi støða, tí ein sjálvstýrisrørsla eigur at verða borin uppi av stoltum hugsanum um egnar møguleikar og egin evni. Men tað er samstundis besta prógvið um, at málið, sum landsstýrið hevur sett sær, er ikki eitt mál, sum fólkið stendur aftanfyri. Fullveldið er ynski hjá einum minniluta, tí var talan um eina fólkasøk, so hevði tað í sjálvum sær givið landsstýrinum ta neyðugu styrkina, sum skal til, at náa málinum.

Eg havi so mangan sagt, at eg havi stóra virðing fyri teimum føroyingum, sum ynskja loysingina uttan mun til, hvat fylgjan og kostnaðurin verður. Eg eri ikki samdur við teimum, men eg virði teirra støðu. Tað er ein erlig søk, men eg kann als ikki foreina meg við tey fullveldisfólkini, sum ynskja loysingina upp á danska fígging og vælvild, og fáa vit hana ikki, so er tað tí danir eru imperialistar og koloniharrar o.l. Tað er sum danir siga, „at pynte sig med lånte fjer."

Men ynski um føroyskt sjálvstýri og ynski um føroyskt sjálvbjargni kann gerast ein fólkasøk, um vit bert gera okkum tann ómak og taka okkum ta tíð, tað tekur at finna fram til hesa semju. Semjan liggur hjá Føroya fólki, og tað er ein politisk uppgáva at dyrka hesa semju fram. Men henda semja eitur hvørki føroyskt fullveldi við danskari vælvild ella føroyskt fullveldi við donskum smásinni, og henda semja eitur heldur ikki okkurt hissini nýskipanaruppskot, sum bert hevur onkrar smávegis broytingar av verandi heimastýrislóg. Men henda semja liggur eitt ella annað stað millum uppskot landsstýrisins um fullveldi og uppskot Sambandfloksins til nakrar varligar justeringar av verandi skipan.

**Sjálvandi grundleggjandi broytingar**

Eg eri ikki ósamdur við Hvítubók, tá hon á blaðsíðu 67 sigur, at tað er ynski um grundleggjandi broytingar á trimum viðurskiftum, sum eru orsøkin til hesa fullveldistilgongd. Tað eg her royni at siga er, at eg hóast ikki samdur um fullveldið, so eri eg samdur, at vit mugu fremja hesar grundleggjandi broytingarnar. Tær eru:

• Vit mugu fáa sligið fast, at heimildirnar hjá føroyskum myndugleikum ikki stava frá umboði (delegatión), sum danskir myndugleikar hava givið og kunnu taka aftur.

• Vit mugu fáa sligið fast, at løgtingslógir eru á sama rættarstøði sum fólkatingslógir og ikki kunnu verða trokaðar til viks av fólkatingslógum.

• Vit mugu fáa víðari heimildir til at samráðast og at gera sáttmálar við onnur lond enn tær núverandi.

Men tað, sum eg samstundis royni at siga er, at ikki er neyðugt at fara yvir um ánna eftir vatni. Vit kunnu fremja áðurnevndu grundleggjandi broytingar í einari nýggjari skipan millum Føroyar og Danmark, sum er innan fyri ríkisfelagsskapin. Hetta kann fremjast við einari Sjálvstýrislóg.

**Sjálvstýrislógin ikki eitt alternativ, men loysnin**

Stjórnin hevur nú meira enn einaferð boðað frá, at hetta við delegatiónina, sum hevur verið eitt stríðsmál síðan 1948, kann endaliga fáast upp á pláss í einari nýggjari skipan. Forsætismálaráðharrin hevur brúkt orðið „uigenkaldelighed", sum merkir, at heimildirnar hjá Løgtinginum kunnu ikki takast aftur. V.ø.o. verður Føroya Løgting hægsti myndugleiki í øllum málum, sum vit hava yvirtikið. Vit fáa evsta vald á yvirtiknum málum - eingin er yvir Løgtinginum í yvirtiknum málum.Tá vit so samtundis við einari Sjálvtýrislóg fáa tikið allar forðingar burtur fyri, hvørji øki kunnu yvirtakast, er vegurin greiður til veruligt føroyskt sjálvstýri og til veruligt føroyskt sjálvbjagni. Tá er avgerðin einsamøll okkara. Hetta er samstundis ein viðurkenning av teimum sjónarmiðum, sum Harhoff, professari hevur staðið fyri.

Treyt nummar tvey síggi eg sum eina beinleiðis fylgja av, at vit fáa treyt nummar eitt upp á pláss.

Viðvíkjandi tí triðju treytini, so hevur danska stjórnin eisini meira enn einaferð sagt, at vit føroyingar mugu gerast meira sjónligir á tí uttanríkispolitiska økinum, og at føroyingar skulu sjálvir taka avgerðir og føra samráðingar á teimum økjum, sum hava týdning fyri okkum. T.v.s. at vit einsamallir føra samráðingar og gera avtalur á t.d. økjum sum fiskivinnu, handil, mentan og umhvørvi.

Eisini hevur danska stjórnin boðað frá, at um vit nú gera eina nýggja skipan ella eina nýggja Sjálvstýrislóg millum Føroyar og Danmark, so skal henda fráboðast altjóða samfelagnum, soleiðis at umheimurin veit, hvør skipan er galdandi millum hesi bæði londini.

**Lat okkum gera sjálvstýrismálið føroyskt**

Við hesum grundarlagi ber veruliga til at fara at tosa um reellan sjálvstýrispolitikk í Føroyum. Eg vil fara so langt sum at siga, at okkara uppskot um eina Sjálvstýrislóg er ikki longur eitt alternativ til ætlan landsstýrisns um eitt fullveldi, men hetta er loysnin til veruligan føroyskan sjálvstýrispolitikk, sum kann fáa breiða undirtøku millum manna.

Við einari slíkari gongd verður tað føroyingar sjálvir, sum gera av, hvussu skjótt sjálvstýristilgongdin skal ganga. Hetta kann alt gerast í takt við okkara fíggjarligu og umsitingarligu førleikar. Tá verður hvørki neyðugt at tosa um eina skiftistíð ella, at danskir myndugleikar okkara vegna skulu umsita málsøki, ella at vit missa rættindir, sum vit í dag hava. Tá ber til alla vegin at hava greiðar linjur, har vit føroyingar hava fult tamarhald á gongdini.

Gongdin, sum nú liggur í kortinum hjá landsstýrinum, hvílir á danskan vælvilja. Enntá er man farin so langt, at landsstýrið nú sigur, at próvbyrðan fyri tí sjálvberandi búskapinum er donsk. Danir skulu prógva yvir fyri okkum, at avtalaða skiftistíðin er grundarlag fyri einum føroyskum búskapi. Danir eiga seinasta orðið um føroyskt fullveldi.

Lat okkum fáa sjálvstýrismálið aftur á føroyskar hendur - lat okkum fremja ta loysn, sum júst passar til okkara viðurskifti.

**Jóannnes Eidesgaard**

# »Hví tað loysir seg at gevast«

*Eg havi roykt í 20 ár. Er ikki longu ov seint?*

Nei! Tey góðu tíðindini eru, at tað er ongantíð ov seint at gevast. Tú skerjir vandan fyri sjúkum, ið standast av tubbaki, næstan alt fyri eitt, tú heldur uppat at roykja, sjálvandi er betri, skjótari tú gevast.

Eftir:

tjúgu minuttum tekur nøgdin av tubbakseitri at minka og blóðtrýstið, hjartaslátturin og pulsurin verða aftur sum tey eiga at vera. Hetta ger, at vandin fyri hjartaslagi minkar

tólv tímum – nøgdin av kolsúrevni í blóðinum minkar og nøgdin av súrevni økist

einum mánaði fert tú at duga betur at meta um, hvussu okkurt angar og smakkar. Lungnapípurnar verða smidligari, so tað verður lættari hjá tær at draga andan. Kroppurin hevur stríðst við at endurbøta nervalagið. Tú fert kanska at varnast, at tú orkar meira

tveimum til trimum mánaðum fært tú kanska 30% av lungnavirki aftur. Tú fert at orka meira og føla, at tú fært gjørt fleiri kropsvenjingar.

seks til níggju mánaðum – útlitini til at tú fært lungnasjúku eru minni, tí kyknurnar, sum klæða lunguni, nú aftur verða so sum tær skulu vera og gera sítt til, at lunguni hjá tær eru rein og heilsugóð

einum ári – vandin fyri, at tú fært hjartasjúku er skorin niður í helvt, tú hevur eisini skert vandan fyri striki, lungnasjúku og fleiri sløgum av krabbameini, teirra millum lungna-, hálsa- (lívmóðurhálsa-), bløðru- og nýrakrabba og krabba í brisi, barkakýla og vælindi

fimm árum – vandin fyri at tú fært lungnakrabba er umleið helvtina av vandanum hjá honum, ið roykir ein pakka um dagin

tíggju árum – vandin fyri at tú fært lungnakrabba er næstan líka lítil sum hjá einum, ið ikki roykir! Frískar kyknur eru komnar í staðin fyri tær kyknurnar, ið koma áðrenn krabbameinskyknurnar koma.

Tikið úr »Tá ið síðsta sigarettin er roykt«, Amerikanska tubbaksráðið. 1995, 1996.

Gevst tú at roykja, skerjir tú eisini vandan fyri at tey, sum eru uttan um teg og anda roykin frá tær niður í seg, verða sjúk.

Næstu ferð: Vandin við at vera passivur roykjari.



*Erling Olsen, danskur politikari í ein mansaldur:*

# Kvetta føroyingar á stokkinum er skiftistíðin uppá fýra ár nóg mikið



*Erling Olsen, fyrrv. ráðharri og fólkatingsformaður heldur tað eru so nógvar aðrar leiðir at økja um sjálvstýri føroyinga enn at kvetta á stokkinum, sum landsstýrið leggur upp til.*

JAN MÜLLER

Millum mongu gestirnar í Føroyum í sambandi við 1000 ára haldið fyri kristniboðanina var eisini formaðurin í grunninum, sum hevur verið við til at fíggja haldið, Erling Olsen, fyrrverandi fólkatingsmaður, ráðharri og tingformaður.

Hann fór úr donskum politikki fyri tveimum árum síðani men hevur framvegis stóran áhuga fyri øllum tí, sum fer fram á politiska leikpallinum. Erling Olsen hevur eisini havt stóran áhuga fyri føroyskum viðurskiftum og hevur verið ein av heitastu talsmonnunum í danska javnaðarflokkinum fyri at ganga ynskjunum hjá føroyingum um størri sjálvstýri á møti. Tá tað er sagt skal eisini sigast, at hetta er innan fyri Ríkisfelagsskapin.

Nú fáar dagar undan 3. samráðingarumfarinum millum Føroyar og Danmark um fullveldisætlaninar hjá landsstýrinum hevur hesin „garvaði" danski politikarin einki ímóti at siga sína hugsan, tí nú stendur hann mest sum eygleiðari á síðulinjuni til tað, sum hendir á politiska vígvøllinum. Hann er ikki bundin av tagnarskyldum ol, men kann tosa frítt frá livrini um øll mál, hann hevur áhuga fyri og sum hann metir seg hava skil fyri eisini.

### Stórir møgleikar

Tað er so einki dulsmál, at Erling Olsen sær nógv størri møguleikar fyri at fáa økt sjálvstýri innan Heimastýrislógina og innan fyri Ríkisfelagskapin.

Honum dámar einki ta víðgongdu leið, sum landsstýrið hevur sett út í kortið.

- Men vil landsstýrið kvetta á stokkinum við Danmark, soleiðis sum samráðingarupplegg teirra eisini leggur upp til, so mugu vit danir bara taka tað til eftirtektar. Og tá haldi eg eisini fýra ár eru nóg nógv sum skiftistíð.

Erling Olsen heldur tó, at tað má bera til at finna eina loysn innan fyri Ríkisfelagsskapin, sum kann gagna báðum londum. - Eg teljist millum teir danir, har ríkisfelagsskapurin hevur nakað at siga. Ríkisfelagsskapurin hevur týdning bæði søguliga, mentanaliga og familjuliga. Eg síggi helst ikki, at hann dettur niðurfyri, men sjálvandi er hetta ein avgerð, sum føroyingar sjálvir taka. Fyri meg merkir Ríkisfelagsskapur ikki, at tað eru danir, sum skulu ráða og bestemma. Eg meini bert, at tað ber til at koma víðari innan fyri henda karmin.

Erling Olsen sigur víðari, at sjálvandi skulu danir hava virðing fyri føroysku ynskjunum um størri sjálvstýri, men verður hetta gjørt á slíkan hátt sum mangt bendir á, nevniliga við at venda Danmark bakið, og tað tí er at meta sum eitt seinasta farvæl, so heldur hann eisini, at fýra ár eru nóg mikið at fáa hetta frá hondini í. -Føroyingar eru eisini sera dugnaligir, so tað man fara at bera til innan fyri hetta tíðarskeiðið.

### Hetta er slit

Erling Olsen heldur sjálvur, at tað eru so nógvir aðrir møguleikar at tacla støðuna uppá, eitt nú at taka tingini stig fyri stig í mun til hetta endaliga stigið hjá landsstýrinum, sum hann metir sum eitt veruligt slit í samstarvinum við Danmark.

-Eg haldi vit hava skyldu til at bera okkum væl og skilagott at móti hvørjum øðrum, tá hugsað verður um tey bond, sum eru knýtt millum fólkini í mong mong hundrað ár.

*-Hvat sigur tú til tey, sum seta spurnartekin við Ríkisfelagsskapin og skýra hann einki annað enn tóma luft?*

- Við fullveldisætlanini hjá landsstýrinum í hondini, so er tað rætt, at Ríkisfelagsskapurin er einki annað enn tann bera luft.

Erling Olsen hevur sjálvur havt nógv við Føroyar og føroyingar at gera. Hann hevur verið her ótaldar ferðir og hevur eisini havt tilknýti til nógvar føroyingar í Danmark.

Nú vitjaði hann so sum formaður í grunninum, sum var við til at stuðla 1000 ára haldinum fyri kristniboðanina í Føroym. -Eg haldi føroyingar eru sera dugnaligt og stolt fólk, ið eg í allar mátar havi stóra virðing fyri. Her hugsi eg ikki minst um tey mongu mentanarfólk tit hava fostrað, og her kann eg ikki lata vera við at nevna William Heinesen.

*-Men tá føroyingar eru eitt stolt og gott fólk, skilur tú so ikki eisini teir føroyingar, sum vilja vera ein sjálvstøðug tjóð?*

- Tað geri eg væl, men harfyri nýtist tú ikki kvetta øll bond millum londini. Ger tú tað, so verður Ríkisfelaskapurin til luft og einki annað.

*-Hví hevur tað so nógv at siga fyri teg sum dana, at Føroyar halda fram sum partur av Ríkisfelagsskapinum tú tosar um?*

-Tað er ringt at siga frá. Tað eru nøkur ting, sum eru kensluliga og mentanarliga tengd og sum tað er sera ringt at seta orð á. Eg kann í hvussu er siga fyri meg, at eg havi sterkar kenslur í so máta.

*-Men hevur tað ikki nakað at gera við ynskini hjá Danmark at eiga lut í einum so stórum øki, sum alt Føroyar jú eru, og hevur hetta ikki eisini nakað við stórpolitikk at gera, tá Danmark treyðugt vil av við Føroyar?*

-Tað dugi ikki at síggja hevur nakran týdning. Vit eru sum er eitt lítið land. Hetta hevur so heldur einki við stórpolitikk at gera.

### Nyrup gevur seg neyvan

Nú samráðingar verða aftur hósdagin og við tí kunnleika Erling Olsen hevur til danskan politikk og her ikki minst til sínar egnu partamenn og har ikki minst Nyrup spurdu vit hann, um møguleiki er fyri, at Nyrup fer at geva seg í samráðingunum?

-Tað trúgvi eg ikki. Í hvussu so er ikki, tá talan er um skiftistíðina uppá fýra ár. Har fer hann at standa fastur. Meg eg trúgvi, at hann fer at royna at finna aðrar loysnir, sum kunnu vera rímuligar og góðar fyri báðar partar. Eg vóni partarnir koma nærri hvørjum øðrum, men eg beri ótta fyri, at teir ikki gera tað kortini. Hetta er ein prosess, sum tekur nakað av tíð sigur Erling Olsen, sum tó leggur stóra áherðslu á, at hann er farin úr politikki, og tí onga sum helst ávirkan hevur á tann politikkin, sum javnaðarflokkurin og stjórnin reka.

-Hetta er borðið hjá Nyrup, men eg havi eina meining um tingini, og hana havi eg einki ímóti at koma fram við, nú er eri stæddur í Føroyum, tí tað eg sigi, er meint til at vera til felags besta.

### Gamal í garði

Erling Olsen er so heldur ikki nakar tilvildarligur persónur í donskum politikki. Hann er gamal í garði ella tað vit plaga at nevna - hann er garvaður politikari og ein av „the grand old men" á Christiansborg, til hann ikki stillaði uppaftur til seinasta val.

Hann er útbúgvin búskaparfrøðingur og var fyrsti rektari á Lærda Háskúlanum RUC. Hann kom í fólkatingið í 1964 og sat har nærum uttan íhald til 98. Sjálvur sigur hann seg hava verið fólkatingsmaður í ein heilan mansaldur. Hesa tíðina umsat hann tvey ráðharrastørv. Hann var íbúðarmálaráðharri og løgreglumálaráðharri og hann hevur eisini verið formaður fyri fólkatingið.

Erling Olsen hevur verið væl dámdur millum flest allar politikarar á Christiansborg. Hann fekk eisini heitið „Uglin" fyri sítt góða vit og skil.

Nú hann enn einaferð leggur leiðina aftur til Danmarkar úr Føroyum hevur hann eisini nógvan nýggjan førning við sær. Hesaferð ikki til at brúka í politiskum arbeiði, men at hava við sær til hús.

-Eg er heilt hugtikin av øllum tí eg upplivað hesar dagarnar. Ikki minst av tiltøkunum í Norðurlandahúsinum, har hann eisini var við til framførsluna av Jesus og Makedonarin.

-Hetta var ein framúr vøkur framførsla. Eg eri virkuliga ovfarin og havi fingið uppaftur størri alsk til Føroyar eftir hesa stóru upplivingina sigur Erling Olsen, sum heldur tað vera eindømi fyri eitt fólk, at tað skal hava fostrað so nógv mentanarfólk. -Eg haldi tað er ljósið og isolatiónin, sum geva íblástur til tey mongu listarfólkini.

Δ

